# Silkeborg er úti




*Føroyski landsliðsframherjin, sat á beinkinum tá liðfelagarnir úr Silkeborg taptu steypadystin í Esbjerg*
*savnsmynd*

**FÓTBÓLTUR** Christian Lamhauge Holst slapp als ikki upp í part, tá Silkeborg í gjárkvøldið spældi steypadyst móti Esbjerg

Rólant Waag Dam

Talan var um dyst á útivølli, sum Silkeborg tapti 0-2. Føroyski landsliðsleikarin sat á beinkinum dystin á tamb, hóast hann hevði ein ógvuliga avgerandi leiklut, tá Silkeborg spældi seg víðari í steypakappingini.

Holst skoraði nevniliga helst skjótasta málið í donskum fótbólti nakrantíð, tá hann fekk bóltin í netið eftir bara 11 sekundum. Í steypakappingini føra tey ikki statitikk á sama hátt sum í landskappingini, men har er metið altso 16 sekund.

Seinni legði Holst upp til annað mál í dystinum móti B93, sum Silkeborg vann 5-0 og tryggjaði liði hansara víðari luttøku í steypakappingini. Men hetta ævintýrið er nú av á hesum sinni, nú Silkeborg tapti fyri Esbjerg í kvøld.

*rolant@sosialurin.fo*




*Gulu tjaldurskvinnurnar skulu til Klaksvíkar at dystast við føroyameistararnar úr Stjørnini*
*savnsmynd*

# Oddabrak í Klaksvík

**HONDBÓLTUR** Liðini, sum hava runnið undan hinum seinastu árini, skulu nú standa yvir av hvørjum øðrum. Stjørnan og Tjaldrið spæla í Klaksvík sunnudagin

Uni Holm Johannesen

Nú er hondbóltskappingin hjá kvinnum um at taka skap. Oddurin líkist sær sjálvum. Stjørnan, Neistin og Tjaldrið eru á fremstu plássunum. Spurningurin er nú, hvør vinnur kappingina um ovastu plássini.

Eitt innanhýsis tak verður tikið sunnudagin.

Tjaldrið vitjar hjá Stjørnuni.

### Kappast

Stjørnan var greiður føroyameistari í 2010. Tjaldrið rann aftaná og stóð ikki kvinnunum úr Klaksvík kurl.

Tað verður altíð sagt, at meistarin hevur tað torført. Tað noyddist Tjaldrið at sanna.

Stjørnan hevur verið í støðuni fleiri ferðir áður. Tí er spurningurin, um hondbóltsliðið úr Klaksvík kennir seg í serstøðu.

Tað er ein greiður fyrimunur.

Dysturin í vikuskiftinum er aftur ein styrkisroynd.

### Grannauppgerðin í Havn

Neistin koppaði Tjaldrinum á heimavølli í síðstu viku.

Tíðin fer at vísa, um tær eru førar fyri at bjóða av í gullstríðnum.

Sunnudagin spælir Neistin móti Kyndli. Bláu havnarkvinnurnar eru favorittar og skulu greiða sína skyldu, um støðugu oddaliðini ikki skulu renna undan.

Kyndil hevur prógvað, at tær kunnu bjóða teimum bestu í landinum av. Tá tær vitjaðu hjá Stjørnuni var tað ikki fyrr enn í seinastu løtu, at heimaliðið var á vinnarakós.

*uni@sosialurin.fo*

# Ítrótturin um vikuskiftið:

**Fríggjadagin:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR: | Mjølnir – Fleyr | Klaksvík | 18.30 | Menn |
| FLOGBÓLTUR: | ÍF – SÍ | Fuglafjørður | 19.30 | Menn |

**Leygardagin:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR: | VB – StÍF | Vágur | 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR: | SÍ – Ternan | Sørvágur | 15.00 | Kvinnur |

**Sunnudagin:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR: | Neistin – Kyndil | Tórshavn | 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR: | Fleyr – Dráttur | Tórshavn | 14.30 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR: | Stjørnan – Tjaldur | Klaksvík | 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR: | TB – KÍF | Trongisvágur | 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR: | SÍ – Mjølnir | Sørvágur | 15.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR: | Neistin – Kyndil | Tórshavn | 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR: | H71 – Team Klaksvík | Hoyvík | 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR: | KÍF – StÍF | Kollafjørður | 16.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR: | Fleyr – TB | Tórshavn | 16.30 | Menn |

# Nú er Kyndil á skránni

**HONDBÓLTUR** Neistin manglar bara at spæla móti Kyndil í hesum kappingarárinum. Eingin hevur staðið verandi greipuvinnarunum kurl. Nú er spurningurin, um grannarnir kunnu steðga teimum

Uni Holm Johannesen

Fyrsta slagið um Havnina í hesum kappingarárinum verður sunnudagin.

Neistin og Kyndil spæla í høllini á Hálsi. Tá hava flestu liðini somuleiðis lagt fyrsta fjórðingin av hondbóltsárinum aftur um seg.

Neistin er farin buldrandi avstað. Við fimm sigrum eru fremstir, trý stig niður til nærmasta kappingarneytan. Eingin hevur stolið stig frá Neistanum enn. Nú sleppur Kyndil at royna seg.

### KÍF skal reisast

KÍF legði væl frá landi. Seinastu tveir dystirnir hava hinvegin bara givið eitt stig.

Sunnudagin spæla kollfirðingar og StÍF í høllini í Kollafirði. Uppgávan hjá Jan Ottesen, venjara, og hinum er nú at koma aftur á beint aftaná flúgvandi byrjanina. Eydnast tað ikki, og Neistin vinnur, so fánar spenningurin burtur um ovasta plássið fyribils.

H71 hevur vunnið seinastu tveir landskappingardystirnar, og hoyvíkingar eru greiðir favorittar, tá Team Klaksvík vitjar í Hoyvík.

*uni@sosialurin.fo*